

Petur Jacobsen saman við Jannie Jacobsen, sum var model hjá honum, og Elin Gunnarsdóttir, sum gjørdist nr. 3 í kappingini
**Mynd: Jens K. Vang**

*Um vikuskiftið varð kappast um Íslendska meistaraheitið innan hárlist, og innan ein av bólkunum var tað ein føroyingur, sum gjørdist vinnari av kappingini*

# Íslendskur meistari

Jákup Mørk

Ikki kann sigast annað enn, at Petur Jacobsen, sum dagliga starvast hjá Fríðkuni í SMS, hevur góðar hendur.

Fyri nøkrum árum síðani, í 1992 og 1993, luttók hann í Íslendskari kapping millum harfríðkunarfólk, og tær ferðirnar gjørdist hann ávíkavist nr. 2 og 1.

Síðani hetta hevur hann ikki luttikið í nakrari líknandi kapping, men í ár varð so aftur gjørt av at fara til Íslands.

Saman við Elin Gunnarsdóttir, sum eisini starvast hjá Fríðkuni, gekk leiðin aftur til Íslands, og heldur ikki hesu ferð lá úrslitið eftir. Petur vann nevnliga enn eina ferð kappingina, og Elin gjørdist nr. 3, so úrtøkan má sigast at hava verið sera góð.

### Royna okkurt nýtt

Sjálvur greiður Petur frá, hetta við at luttaka í slíkum kappingum, mest verður gjørt fyri at royna nakað nýtt, eins og tað ikki slepst undan, at talan er um eina sera læruríka ferð.

- At úrslitini so eisini hava verið somikið góð, ger bara alt upp aftur stuttligari, og ikki minst var tað ein stór uppliving at koma heim aftur, har móttøka við blómum og øllum var fyrireikað í Fríðkuni, sigur Petur.

Hann greiður annars frá, at tá hann hinar báðar ferðirnar var í Íslandi og royndi seg, var hetta einamest tí Jákup Eið, sum tá starvaðist í Fríðkuni, vildi sleppa at royna hetta. Jákup var eisini við tær báðar ferðirnar, og gjørdist hann nummar fýra í 1993.

Nú var tað so Elin, sum eggjaði mær til at koma við sær. Eg játtaði hesum, og sjálvandi er eg sera fegin um luttøkuna.

### Stórarbeiði

Nógv arbeiði skuldi tó leggjast í ætlanina, áðrenn endaliga úrslitið fyrilá. Klæðini, sum modellið hjá Peturi var í, hevði Petur sjálvur evnað til, og heldur ikki var tað løtuverk at riggað hárið til.

Kappingin er skipað soleiðis, at tú hevur loyvi at gera umleið helvtina av sjónliga partinum, áðrenn tú fert á pallin, og hetta hevði Petur so eisini gjørt. Í einar 7 tímar finglaðist hann við at seta jarnstengur og annað í hárið á unnustuni, Jannie, áðrenn tey um fimm tíðina fóru á pallin at leggja seinastu hond á verkið.

Eftir 40 minuttir á pallinum var tíðin uppi, og so var bara at bíða, til dómararnir komu við sínum metingum av avrikinum.

Eftir at tey høvdu verið á pallinum, varð skipað fyri stórum døgurða millum allar luttakararnar, og síðani vóru vinnararnir úr ymsu bólkunum kunngjørdir. Talan var um eina rúgvu av bólkum, og tá bólkurin hjá Peturi og Elini, ið nevndist Free-style, var millum teir seinastu, gjørdist talan um eina hampuliga drúgva bíðitíð.

### Einki HM

At enda spurdu vit Petur, um hann kundi hugsað sær at roynt seg í enn størri kappingum. Hann greiddi frá, at tað kanska ikki hevði verið so galið, men sum er, hevur hann ongan møguleika at vera vi til eitt nú HM. Hetta tí at føroyingar ikki eru altjóða skrásettir innan hárlist.

- Fyri at kunna luttaka í HM, skalt tú fyrst hava verið meistari í tínum landi, so um eg skal luttaka í slíkari kapping, skal eg fyrst vinna DM, so tað er ikki nakað, sum eg gangi og hugsi um, sigur Petur.

# Byggihugur í Vestmanna

*Bústaðartrot er so smátt farið at merkjast í Vestmanna. Hetta kann leggja trýst á Vestmanna kommunu, at seta sjøtil á nýggja sethúsútstykking*

Dánjal Højgaard

Ljós er nú aftur í nógvum av húsunum, sum stóðu tóm í Vestmanna í kreppuárunum. Vestmenningar kunnu fegnast um, at áhugi aftur er fyri at búseta seg í bygdini, og fleiri hava keypt sær hús í Vestmanna tey seinastu árini.

Samstundis sum fá hús standa tóm longur er tað blivið trupult, at finna ein bústað at leiga í Vestmanna.

Hagtølini boða frá stórari tilflyting. Eftir bert tveimum árum er fólkatalið í Vestmanna vaksið við 70 fólkum. Í dag búgva 1210 fólk í kommununi.

### Fleiri fyrispurningar

Síðani kreppuna fyrst í 90-unum hevur verið smátt við sethúsabygging í Vestmanna, og lítil og eingin áhugi hevur verið fyri grundstykkjunum hjá kommununi. Men vend tykist at vera komin í.

Í dag fær kommunan „av og á“ fyrispurningar og umsóknir frá fólki, ið hava hug at byggja í Vestmanna, verður upplýst á kommunuskrivstovuni. Nøkur grundstykki eru tøk í kommununi, men áhugin fyri júst hesum grundstykkjum tykist at vera avmarkaður. Hinvegin eigur kommunan eitt byggilendi til 50 sethús, sum ikki er útstykkjað enn. Áhugi tykist at vera fyri hesum byggiøki, og okkurt bendir á, at ein nýggj útstykking hevði tað stimbrað byggihugin.

Ongar ítøkiligar ætlanir eru tó um nakra nýggja sethúsaútstykking í Vestmanna. Aðrar kommunalar uppgávur troðka meira beint nú, frættist av kommunuskrivstovuni.



*Fólkatalið í Vestmanna veksur støðugt. Fleiri vilja sleppa at búseta seg í kommununi, eisini avbygdafólk*
**Mynd: Jens Kr. Vang**





# Rás 2 á vitjan í Klaksvík

*Í gjár fundaðist Rás 2 við verandi og møguligar nýggjar samstarvsfelagar í Klaksvík. Ætlanin er at gera sendingar úr Klaksvík, tá sendarin á Brúnaskarði fer at senda*

Eyðun Klakstein

Í gjár fór ein sendinevnd hjá Rás 2 til Klaksvíkar at kunna seg um ymisk viðurskifti.

Rás 2 skuldi á fund við Norðoya Sparikassa, har teir skuldu tosa um sendaran, sum sparikassin í norðoyggjum hevur keypt til rásina. Hendan útgerð er bíløgd, og nú er talan um dagar, áðrenn Rás 2 kann hoyrast í Klaksvík og størri parti av Eysturoynni.

– Vit fara eisini at tosa við Norðlýsið og Studio Pegasus um møguligt samstarv, segði Petur Jacobsen, tá hann var á veg norður til Klaksvíkar fyrrapartin í gjár.

### Senda lokalt tilfar

Rás hevur ætlanir um at gera tilfar úr Klaksvík, og millum møguligar samstarvsfelagar eru lokalblaðið Norðlýsið og Studio Pegasus. Sosialurin hevur skilt, at talan eisini kann verða um at senda lokalt tilfar úr Klaksvík til klaksvíkingar, men enn er einki ítøkiligt í hesum.

Rás 2 hevur fingið øll neyðugu loyvi, men teir mangla seinasta pappírið frá Føroya Tele, áðrenn teir kunnu seta nýggja sendaran upp á Brúnaskarði. Hesi viðurskifti koma í rættlag innan fáar dagar.

Klaksvíkingar, sum framyvir ætla sær at flyta útvarpslurtið av tí almenna útvarpinum og yvir á Rás 2, skulu sikta eftir 107,0 MHz, sum verður frekvensurin, sum sendarin á Brúnaskarði fer at senda á.

# Sparikassastjórin sagt seg úr starvi

Jóannes Poulsen hevur sagt seg úr starvinum sum stjóri í Norðoya Sparikassa.

Fyrrverandi stjórin í Føroya Banka í Klaksvík, hevur verið stjóri í sparikassanum síðani 1995, tá hann avloysti Brynjolf Jacobsen.

Jóannes Poulsen sigur, at hann er farin um tey seksti árini, og at krøvini til peningastovnin gerast alsamt størri. Tí heldur hann, at tíðin er búgvin til, at yngri kreftir taka yvir.

Enn er eingin støða tikin til, hvør skal avloysa Jóannes í sessinum sum sparikassastjóri.

**ek**

SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE



## Nýggj skeiðtænasta frá Farodane í eksklusivum umhvørvi

***Sum liður í meginregluni: at vera fullfíggjaður heildarveitari á sínum øki, fer Farodane í næstum undir skeiðtænastu við fjølbroyttum úrvali og í eksklusivum umhvørvi. Talan verður bæði um traditionell skeið, sum t.d. teldukoyrikortið, og serskeið, m.a. innan grafisk forrit og internetið***

### TELDUKOYRIKORT

Teldukoyrikortið er evropeiskt prógv, sum er grundað á góðkendan KT-førleika. Ein førleika, sum prógvar at luttakarin hevur staðið sjey royndir í nýtslu av teldu og mest vanligu forritunum.
Teldukoyrikortið er grundað á royndir innan tey sjey fakøkini, sum eru mest umráðandi sambært KT-krøvunum í upplýsingarsamfelagnum í dag.
Royndirnar kunna takast á royndardepli, sum er góðkendur av Dansk dataforening. **Skeiðstovan Kvasir** er góðkendur royndardepil.
Tá næmingurin hevur staðið fyrstu royndina av teim sjey, fær næmingurin eitt **Skills Card**, sum vísir nær og hvønn part av teldukoyrikortinum næmingurin hevur staðið.
Tá ein hevur staðið allar sjey royndirnar, fær ein teldukoyrikortið.

**Fyrsta skeiðið byrjar 4. apríl**

### NAVISION

Saman við **Vision Software** verður skipað fyri frálæru innan **Navision** og **Navision Financials**.
Um ynskist er einki til hindurs fyri, at vit skipa fyri øðrum skeiðum, so sum:

- ***Serskeið til júst tygara fyritøku***
- ***Skeið innan ávísar serskipanir***
- ***Einstaklingaskeið fyri brúkarar og meistarabrúkarar***

Skeiðleiðarar okkara hava allir holla roknsskaparliga vitan eins og teir eisini hava kunnleika til fyrisiting í breiðari merking.

**Fyrsta skeiðið byrjar 6. apríl**

### DTP-SKEIÐ

Skeiðið fevnir um frálæru í grundleggjandi vitan innan typografi, layout, myndaviðgerð, skanning, tekning og brúki av illustratiónum og litum. DTP-koyrikortið er ein væl tilrættaløgd gongd fyri nýggjar DTP-brúkarar á virkjum,sum ætla at byrja uppá lutvísa innanhýsis framleiðslu ella sum ein hjálp í samskiftinum við lýsingastovur, prentsmiðjur og aðrar grafiskar fyritøkur, tá prentlutir o.a. skulu leggjast til rættis ella framleiðast. Alt ræður jú um at byrja rætt og taka røttu avgerðina um, hvussu langt ein sjálvur skal vera við í framleiðsluni frá hugskoti til liðnan prentlut v.m.

**DTP-skeiðini eru hesi:**
1. Adobe PHOTOSHOP
2. Adobe INDESIGN
3. Adobe ACROBAT
4. KLÁRT TIL PRENT
5. Adobe ILLUSTRATOR

**Fyrsta skeiðið byrjar 10. apríl**

### WEB-SKEIÐ

Tað koma støðugt fleiri forrit á marknaðin til at viðgera, byggja upp og broyta heimasíður.
Vit hava valt at seta saman eitt WEB-Koyrikort, sum fevnir um nøkur av teimum best umtóktu forritunum innan WEB-design.

**WEB-skeiðini eru hesi:**
1. Adobe GOLIVE
2. Adobe IMAGEREADY
3. Macromedia FLASH
4. Adobe ACROBAT
5. KLÁRT TIL INTERNET

**Fyrsta skeiðið byrjar 3. apríl**

### ACROBAT/PDF SKEIÐ

Acrobat og PDF verða sera nógv umtalað í løtuni.
PDF-formátið verður góðkent á støðugt fleiri støðum sum skjalaviðgerðarformát. Tað vil siga, at skjalaviðgerð og skjalaflutningur gjøgnum internetið og sum elektroniskur ”prentlutur” v.m. hevur PDF sum fíl-formát.

**Fyrsta skeiðið byrjar 12. apríl**

**TILMELDING á heimasíðu okkara:**
kvasir.farodane.fo
**- ella ringið tlf. 211861 ella 311414. e-mail:**
kvasir@farodane.fo



fd-3-00



SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE

SKOTARÓK 14 • 100 TÓRSHAVN • TLF. 211861 og 311414 • FAX 317534